gult cyan magenta svart

Ongan muss frá stjóranum

Lei›arar skulu vísa gó›an atbur› sum vóru teir til arbei›is, tá i› jólabor›haldini eru, skrivar Vinnuhúsi›

»Lei›arar skulu hvørki geva ella móttaka jólakossar til jólabor›haldi›. Ongar umberingar eru galdandi.« Hetta er ein sera grei› útmelding frá Lederness Hovedorganisation til tey árligu jólabor›haldini, og sum eisini ver›ur nevnd í tí›indaskrivinum frá Vinnuhúsinum.

Lei›arar skulu vísa gó›an atbur›, sum vóru teir til arbei›is, tá i› jólabor›haldini eru. Teir skulu drekka alkohol vi› máta og vera ein gó› fyrimynd fyri virki›. Um so er, at ein av stjórunum fjæsast vi› einum av starvsfólkunum, sendir hann eitt vánaligt tekin til hini starvsfólkini, sigur Vibeke Skytte, starvsfólka- og administratiónslei›ari í Ledernes Hovedorganisation.

Avtalur

Hon mælir til, at lei›slan á virkjunum skal, á›renn jóladøgur›an, gera avtalu um, hvussu stjórar vi› jólaævint‡rum í huga skulu lærast.

Í útgangsstø›inum skulu starvsfólk og stjórar altí› halda labbarnar frá hvørjum ø›rum. Hervi› er ikki sagt, at ein stjóri og eitt starvsfólk ikki mugu hava eitt varandi samband. Oftani er møguleikin fyri at skilja ímillum ska›iligt jóladøgur›akossarí og eitt stillfarandi fjas, sum kann enda vi› einum parsambandi, heldur Vibeke Skytte.

Hon metir ikki, at ni›urskriva›ar reglur fyri atfer› hjá stjórunum, tá teir eru til veitslur, eru ney›ugar á smærri virkjum, men á størri virkjum er ta› størri tørvur á tí, skrivar Vinnuhúsi›.

Um oljulóggávuna – heilsu, trygd og umhvørvi

Anni á Hædd, løgfrø›ingur í Oljumálast‡rinum helt herfyri fyrilestur á fundi í Oljutinginum um oljulóggávu, heilsu, trygd og umhvørvi. Vit prenta innlegg hennara

Sum vinnugrein ver›ur oljuvirksemi› yvirhøvur rokna› sum vandamiki›. Ein høvu›sorsøkin til hetta er, at óhapp og vanlukkur kunnu fáa so ógvusligar avlei›ingar og fylgir fyri manning, havstø› ella pallin - eins og umhvørvi. Flestu av okkum hava hoyrt um Piper Alpha-vanlukkuna, Aleksander Kielland-vanlukkuna og a›rar vi›kanska.

Ta› er m.a. orsaka› av tí stóra risikopotentialinum, sum er í oljuvinnuni offshore, at samfeløg seta strong krøv til virksemi hvat heilsu, trygd og umhvørvi vi›víkur, umframt til dygt eftirlit vi› virkseminum fyri yvirhøvur at loyva tí. Solei›is er eisini í Føroyum og tí fari eg at siga eitt sindur um oljulóggávuna — kolvetnislógina.

Oljulóggáva – Kolvetnislógin

Lógin um kolvetnisvirksemi var› samtykt av Løgtinginum tí›liga á vári longu í 1998. Enn eru ongar kunnger›ir settar í gildi vi› heimild í lógini, men slíkar eru væl álei›is.

Lógin regulerar oljuvirksemi í øllum skei›um — forkanningar (seismikk), leiting eftir olju og metingar (seismikk á sta›num og leitiboringar), framlei›slu eins væl og avrigging av virkseminum — ein ring av virksemi frá byrjan til enda, eisini rópt virksemi frá vøggu til grøv.

Lógin hevur reglur um loyvi og treytir og hvussu farast skal fram í samband vi› útbjó›ing. Lógin hevur reglur um hvørjar gó›kenningar oljufeløgini skulu søkja myndugleikan um fyri yvirhøvur at sleppa í holt vi› virksemi› — ta› at bora eftir olju.

Lógin sigur at virksemi› skal vera forsvarligt. Lógin gevur landsst‡rismanninum beinlei›is heimild til at regulera heilsu, trygd og umhvørvi í samband vi› leiting, framlei›slu og flutning av kolvetnum.

Samanumtiki› kann sigast, at lógin regulerar alt, sum hevur vi› oljuvirksemi at gera, tí hon regulerar bæ›i virksemi og heilsu, trygd og umhvørvi í samband vi› hetta virksemi›.

Leitiloyvini

Sum kunnugt eru loyvini til leiting eftir olju og gassi í fyrsta útbjó›ingarumfari givin. Sambært § 6 í lógini kunnu leitiloyvi bert veitast umsøkjarum, sum ætlandi hava ney›ugan sakkunnleika, royndir, førleika og fíggjarorku.

Hetta krav ella kanska rættari henda fortreyt fyri at fáa loyvi til leiting eftir olju og gassi umfatar eisini heilsu, trygd og umhvørvi. Ein arbei›sbólkur vi›gjørdi allar umsóknirnar fyri at meta, um umsøkjarnir høvdu nóg gó›an sakkunnleika, royndir, førleika og fíggjarorku hvat vi›víkur heilsu, trygd og umhvørvi fyri at sleppa uppum gáttina, sum lógin hevur sett.

Ta› sum nú liggur fyri framman hjá hesum oljufeløgum sum hava fingi› loyvi í fyrsta útbjó›ingarumfari eru leitiboringarnar, sum oljufeløgini skulu bora, sambært teimum veittu loyvunum.

Sambært § 15 í lógini kunnu leiti- og a›rar boringar ikki fara í gongd, uttan at landsst‡ri› frammanundan hevur gó›kent útger›, arbei›sætlan og mannagongd. Hetta merkir, at oljufeløgini mugu søkja Oljumálast‡ri› um gó›kenning til at seta boringina í verk.

Sambært lógini eru leitiboringar virksemi›. Í § 14 er ásett, at ”Virksemi› skal vera umhvørvisliga og trygdarliga forsvarligt_” Hetta merkir, at virksemi skal vera forsvarligt, óansæ› um talan er um leiting ella framlei›slu av olju ella gassi. Ta›, at virksemi› skal vera forsvarligt er eitt dynamiskt krav, eitt krav sum vil broytast vi› tí›ini í takt vi› at tøkniligu møguleikarnir alsamt økjast. Ta› sum var forsvarligt fyri 10 árum sí›ani er ikki ney›turviliga forsvarligt í dag. Hetta hevur m.a. vi› sær, at myndugleikin uttan trupulleikar kann seta oljufeløgunum krav um, at tey stø›ugt skulu royna at menna seg fyri at betra um heilsu-, trygd- og umhvørvisumstø›urnar offshore.

Trygdarregluverki

Afturat lógarásetta kravinum um forsvarligt virksemi, hevur lógin í kap. 5 heimildir til landsst‡rismannin at áseta neyvari reglur um heilsu, trygd og umhvørvi í samband vi› virksemi.

Arbeitt ver›ur vi› at gera kunnger›ir, sum áseta neyvari krøv til heilsu, trygd og umhvørvi í leitiskei›inum — ikki fyri eitt møguligt framlei›sluskei›, tí hetta liggur nógv ár úti í tí›ini.

Hesa kunnger›irr eru løgfrø›iliga sæ› einans at rokna sum ískoyti› til a›alkravi› í lógini um forsvarligt virksemi.

Ein avlei›ing av hesum er, at myndugleikin ikki alsamt n‡tist at vera eitt fet frammanfyri menningina innan heilsu, trygd og umhvørvi fyri á tann hátt at ver›a førur fyri at seta krøv til virksemi›. Nei, kravi› um forsvarligt virksemi er óreingiligt — óansæ› hvussu nógva ella lítla orku og ekspertisu myndugleikin sjálvur hevur á teimum ymisku økjunum.

Funktionelt (starvsligt) regluverk

Vit hava lagt okkum eftir at or›a eitt funktionelt regluverk. Hetta merkir, at vit í kunnger›unum áseta krøv til oljufeløgini, sum siga naka› um hvat tey skulu gera fyri at lúka krøvini til heilsu, trygd og umhvørvi, men vit siga ikki hvussu tey skulu ella kunnu lúka krøvini.

Hetta sampakkar vi› ta› reguleringsfilosofi, sum meira og meira ger seg galdandi fyri oljumyndugleikar og til deils a›rar myndugleikar í londunum kring Nor›sjógvin. Myndugleikin or›ar krøv, sum áseta hvat mi›ast skal eftir í samband vi› hetta ella hatta virksemi›, uttan tó út í æsir at l‡sa hvussu máli› skal røkkast.

Fyri oljufeløgini merkir hetta m.a., at tey fáa størri rásarúm til at skipa og útgera seg til oljuvirksemi› á tann hátt, sum tey meta vera best hóskandi ella sum tey duga best. Eisini gevur ta› funktionella regluverki størri rúm fyri n‡hugsan, enn um vit út í æsir skuldi l‡st og ásett hvørt nikk og prikk.

At enda vil eg siga eitt sindur um, hvør ta› er, sum hevur ábyrgd av at virksemi› ver›ur framt forsvarligt hvat heilsu, trygd og umhvørvi vi›víkur, ta› sum løgfrø›ingar vilja kalla hvør ta› er, sum er pligt-subjekti›.

Pligtsubjekti› í § 24 og terminologi

Ta› ella tey oljufeløg, sum í felag hava fingi› leitiloyvi, ver›a sambært kolvetnislógini rópt loyvishavin.

Tann, i› útinnir virksemi sambært teimum veittu loyvnum vegna loyvishavan kallast fyristø›ufelagi› — ella meira vanligt operatørurin.

Loyvishavin og fyristø›ufelagi› vilja ver›a tey mest vanligu pligtsubjektini og av teimum bá›um er ta› fyristø›ufelagi› — operatørurin - sum oftast vil hava ábyrgd fyri at virksemi› ver›ur útint forsvarligt. Herí liggur eisini ábyrgd fyri, at galdandi lóggáva — lógir og kunnger›ir — ver›a hildin. MEN ta› eru onnur, sum eftir umstø›unum, kunnu ábyrgjast fyri, at vi›urskiftini vi›víkandi heilsu og trygd ikki eru sum tey skulu. Hetta er ásett í § 24 í lógini:

”Loyvishavarin, fyristø›ufelagi›, stjórin á havstø›ini, arbei›stakarar, undirarbei›stakarar og a›rir arbei›sgevarar skulu hvør í sínum lagi síggja til, at arbei›sumstø›urnar eru fult forsvarligar til trygd og heilsu, og at dygt eftirlit er vi›, at arbei›i› ver›ur gjørt forsvarliga.”

N†GGJAR BØKUR

Tri›ja bind av Føroya Søgu útkomi›

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givi› út tri›ja bindi av "Føroya søgu" eftir Hans Jacob Debes, professara

BÓKAÚTGÁVA

Í hesum bindi ver›ur roynt at binda træ›rirnar aftur til fyrsta og anna› bind. Byrja› ver›ur vi› einum broyttum samfelagsstø›i eftir Gablatí›ina. Greitt ver›ur frá kongliga einahandlinum frá 1709, frá hugsanunum aftanfyri, frá handilsskipanini, vøruframlei›slu, útflutningi og innflutningi, sølu av føroyskum vørum uttanlands og frá øllum t‡›andi pørtum av búskaparskipanini.

Nomi› ver›ur vi› "Vágsbotnstí›ina", og greitt ver›ur frá ney› og ófri›i. Í hesum sambandi slepst ikki undan at grei›a frá frambur›smanninum Nólsoyar-Pálli og virksemi hansara í stutta æviskei›inum, sum enda›i á havinum og bert var komi› í helvt.

Eisini ver›a tikin fram t‡›andi samfelagsmál sum mentan og uppl‡sing eftir si›askifti›. Latínskúlan úti á Reyni í Havn, har i› føroyskir dreingir lærdu t.d. latín, grikskt og hebraiskt, ver›ur vi›gjørdur. Nevnd og l‡st ver›a ritverk um Føroyar.

Álop frá fremmandum skipum og "turkiskum" sjórænarum og verjutiltøk ímóti ágangi ver›a umrødd. Spurningurin um sjómark og havrætt ver›ur tikin fram.

Vi›gjørd ver›a jør› og ognarvi›urskifti, stø›a teirra fátæku og bond og skyldur, sum vóru løgd á tey, og søgan um tey spitølsku á Argjum.

Teir seinastu kapitlarnir eru um tey politisku vi›urskiftini: skilna›in frá Noregi í 1814, avtøkuna av øllum fornum politiskum stovnum, so sum Føroya aldagamla løgtingi, løgrættumannaskipanini og løgmansembætinum, og at Føroyar ver›a gjørdar til eitt danskt amt, st‡rt av donskum embætismonnum.

Aftast í bókini eru keldur og bókmentir og leitor› til bindini 1-3.

Eins og í fyrsta og ø›rum bindi er eisini í hesum bindinum hópur av myndum, nógvar í litum.

Kápumyndina hevur Ingi Joensen gjørt. Hestprent hevur sta›i› fyri sats- og reproarbei›inum, og Scanprint hevur havt prentingina um hendur.

"Føroya søga 3" er 287 sí›ur til støddar og fæst í bókabú›unum fyri 280,- kr.



Hesa myndina mála›i Chr. Rosenmeyer av Tinganesi í 1778. Hús nr. 11 á myndini er latínskúlin, sum var› bygdur í 1628 - álei› har sum Skansagar›ur og Fútahúsini standa í dag. Prestagar›urin, hús nr. 8 standa enn, og framman fyri tey sæst kirkjan, sum var› tikin ni›ur tá Havnar Kirkja var› bygd í 1788. Uttastu húsini á myndini eru Munkastova, sum helst er elsta hús í Havn

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givi› út triju bókina í rø›ini »Føroya Søga«, sum Hans Jacob Debes, professari hevur skriva›

Fyrsta føroyska metbókin

Forlagi› Føroya Met hevur givi› út fyrstu føroysku metbókina

BÓKAÚTGÁVA

Eirikur Lindenskov

Í vikuni kom út fyrsta føroyska metbókin. Ta› er forlagi› Føroya Met, sum gevur út bókina, sum er 200 bla›sí›ur til støddar. Í bókini eru umframt ørgrynnu av reint føroyskum metum, umlei› 180 myndir, siga útgevararnir í tí›indaskrivi.

Ritstjóri er Sonni Jacobsen, og er tilfari› savna› inn seinasta ári›.

Uppsetingina av permuni hevur Páll Joensen í Mi›vági gjørt, og bókin er prenta› á Dimmalætting, sum eisini hevur sta›i› fyri umbrótingini av bókini.

Í for›or›unum í bókini ver›ur sagt, at sum vi› allari byrjan, so hava høvundarnir trilva› seg fram, tí ongar royndir vóru at dúva uppá.

Talan er uttan iva um eina spennandi bók, tí ta› er forkunnugt at lesa um føroysk met. Tó er okkurt sum bendir á, at nóg stórur ómakur ikki hevur veri› gjørdur til tess at kanna eftir, at ta›, i› skriva› hevur veri›, er rætt. Eitt nú stendur á sí›u 16 um fyrsta skúlabygning í Føroyum. Har ver›ur nevndur latínskúlin úti á Reyni í Havn. Her ver›ur sagt, at hann var› bygdur í Havn í 1628 (sum eisini rætt er) »á lei› har H. N. Jacobsens Bókhandil nú er, og hann var› bygdur dygst vi› kirkjuna og prestagar›in, i› stó›u har tá…«

Hetta er beinlei›is skeivt, tí latínskúlin var úti á Skúlareyni. Í bókini er eisini mynd av hesum gamla skúla, og í myndatekstinum ver›ur sagt, at hetta er H. N. Jacobsens Bókahandil.

Høvundarnir blanda her tingini saman. Gamli Bókhandil er gamli Realskúlin, sum var bygdur í 1861 - hann hevur einki vi› gamla latínskúlan at gera.

Latínskúlin lá nærindis prestagar›inum, sum enn stendur úti á Reyni - og har stó kirkjan eisini, til Havnar Kirkja var› bygd í 1788.

Slíkir skeivleikar l‡ta bókina.

Í bókini eru sum nevnt nógvar myndir, men her hava høvundarnir heldur ikki gjørt sær ómak, tí myndagó›skan er út av lagi vánalig.

Sum myndakeldu uppgeva høvundarnir m. a. Sosialin (ta› vita vit her á bla›num einki um) og Dimmalætting, men vánaliga gó›skan bendir á, at høvundarnir hava skanna› myndir úr blø›unum heldur enn at keypa tær frá blø›unum, sum sjálvandi eiga einkarrættin upp á myndirnar.

Summar myndir síggja út til at ver›a kopiera›ar beinlei›is úr Internet-Sosialinum og ø›rum heimasí›um.

Annars ein áhugaverd bók at bla›a í…

gult cyan magenta svart